**Í Útvarpi Føroya segði Torbjørn Jacobsen sunnudagin, at hann bíðaði eftir sínum dómi frá tingbólki Tjóðveldisfloksins. Her eru ítøkiligu viðmerkingarnar hjá tinglimum floksins:**

EYKAFLOKSTING
*Heini í Skorini*
*Heini_skorini@yahoo.com*

**Heidi Petersen:**



Tingbólkur Tjóðveldisfloksins hevur langt síðani tikið støðu til málið um Torbjørn Jacobsen. Tað gjørdu vit longu fyri einum mánaði síðani við okkara egnu undirskrift. Tá varð samtykt, at Torbjørn skuldi sanktionerast fyri sín atburð, sum tó ikki merkir, at hann skal ekskluderast. So okkara áskoðan er heilt í tráð við tilmælið frá flokstinginum um vikuskiftið.

**Hergeir Nielsen:**



Eg havi onga viðmerking til málið í løtuni. Vit skulu fundast í næstum, og ikki fyrr enn eftir fundirnar kann eg neyvari viðmerkja málið.

**Páll á Reynatúgvu:**



Eg havi onga viðmerking til mína egnu sannføring, men eg vil undirstrika, at eg á ongan hátt ætli mær at lýða harraboð í hesum máli. Eg fari treytaleyst at fylgja míni egnu sannføring uttan ávirkan frá uttaru umstøðum.

**Karsten Hansen:**



Tingmanningin hevur tikið støðu til málið fyri einum mánaði síðani. Tað, sum hendi í vikuskiftinum, var ein viðurkenning og undirtøka frá flokstinginum fyri okkara upprunaliga útspæl. So meirilutin í tingbólkinum hevur givið sína áskoðan til kennar, og í vikuskiftinum fingu vit so undirtøku frá flokstinginum.



**Annita á Fríðriksmørk:**

Eg havi onga viðmerking til málið í løtuni.



**Finnur Helmsdal:**

Aðrastaðni í blaðnum í dag hevur Finnur egnar viðmerkingar til málið við yvirskriftini "Høgni Hoydal og moralurin".

# Tingbólkurin hevur talað

**Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Høgni Hoydal, ber ikki ótta fyri, at tingbólkurin hjá Tjóðveldisflokkinum fer at ganga ímóti tilmælinum hjá eyka-flokstinginum um at seta Tórbjørn Jacobsen uttanfyri tingbólkin**

EYKAFLOKSTING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Fyri einum mánaði síðan skrivaði tingbólkurin undir eitt skjal, sum mælti eykaflokstinginum til at seta Tórbjørn Jacobsen uttan fyri tingbólkin, og tí skilji eg ikki, at fjølmiðlarnir enn einaferð rógva fram undir, at tað skal verða spenningur um, hvørja støðu tingbólkurin fer at taka í málinum.

Sambært floksformanni Tjóðveldisfloksins, Høgna Hoydal, tykist lítil ivi vera um, at Tórbjørn Jacobsen verður settur uttanfyri tingbólkin hjá Tjóðveldisflokkinum, tað ið eftir er av valskeiðnum. Høgna Hoydal vísir á, at tingmanningin hevur sagt sína hugsan í málinum fyri einum mánaði síðan, og tá var greiða niðurstøðan, at tingmanningin tók frástøðu frá framferðini hjá Tórbjørn Jacobsen í samband við stríðið við floksformannin.

*Hvat hendir um tingmanningin gongur ímóti tilmælinum um at útihýsa Tobba?*

Øll tingmanningin hevur skrivað undir einaferð, at Tórbjørn skal setast uttan fyri tingbólkin, og tað vænti framvegis er støðan hjá tingfólkunum. Vísir tað seg, at okkurt tingfólk gongur ímóti tilmælunum, verður tú noyddur at spyrja tey, hví tey hava broytt støðu, svarar Høgni Hoydal avgjørdur

Formaður Tjóðveldisfloksins dugir ikki at siga nær tingbólkurin fer at taka endaligu niðurstøðuna í stríðnum, men hann slær fast, at jólini skulu fáast frá hondini, áðrenn tingbólkurin kemur saman aftur at viðgera málið.



*-Fyri einum mánaði síðan skrivaði tingbólkurin undir eitt skjal, sum mælti eykaflokstinginum til at seta Tórbjørn Jacobsen uttanfyri tingbólkin, og tí skilji eg ikki, at fjølmiðlarnir enn einaferð rógva fram undir, at tað skal verða spenningur um, hvørja støðu tingbólkurin fer at taka í málinum.*

*Mynd: Savnsmynd*

### Ikki klókari

Stóri spurningurin, ið framvegis stendur ósvaraður er, hvat í grundini stríðið millum Tórbjørn Jacobsen og Høgna Hoydal snýr seg um. Síðan hvassorðaðu lesarabrøvini hava nógvar gitingar verið um, hvat býr aftanfyri ósemjuni, men tað er framvegis ikki komið fram í ljósmála havt veruliga býr aftanfyri.

– Tað kom einki fram á flokstinginum leygardagin um orsøkina til álopini. Hóast Tórbjørn var biðin um at greiða frá bakgrundini, valdi hann ikki at taka orðið. Sum eg segði tað við Útvarpið sunnudagin, tulki eg ikki málið sum annað enn eina miðvísa ætlan at seta kílar í flokkin, greiðir Høgni Hoydal frá.

### Fólkatingsval

Í donskum fjølmiðlum um vikuskiftið hevur dúgliga verið gitt um, nær danski forsætiráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, fer at skriva út nýval. Flestu serfrøðingar vænta, at Fólkatingsvalið verður antin seinast í januar ella fyrst í februar mánaði komandi ár.

Tað er einki yvir at dylja, at stríðið millum Tórbjørn Jacobsen og Høgna Hoydal hevur Tjóðveldisflokkin undan Fólkatingsvalinum. Á flokstinginum leygardagin gjørdist greitt, at Tórbjørn Jacobsen ikki verður tveittur úr Tjóðveldisflokkinum, tí útihýsingarreglan kann ikki setast í verk við afturvendandi kraft. Spurdur, um tað kann hugsast, at Høgni Hoydal og Tórbjørn Jacobsen verða á sama lista til Fólkatingsvalið svarar Høgni Hoydal:

Hatta havi eg onga viðmerking til. Í samband við val eru ávísar mannagongdir, sum skulu fylgjast, og hatta er fyrst og fremst eitt mál hjá valfeløgunum at taka støðu til.

# Tobbi í bíðistøðu

**-Eg havi verið tjóðveldismaður síðan eg var tannáringur. Hóast eg møguliga ikki verður partur av tingmanningini fara eg at føra sama politikk, eg havi gjørt síðan eg gjørdist politikari- har verður eingin broyting, sigur Tórbjørn Jacobsen, sum bíðar eftir niðurstøðuni frá tingbólkinum**

EYKAFLOKSTING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Harðmælti skiparin situr spentur og bíðar á Langanesi. Hann er vanur við at sita einsamallur á brúnni og stýra, men lagnan hjá baldrutta eysturoyartingmanninum, Tórbjørn Jacobsen, er ikki longur í hansara egnu hondum.

Eykaflokstingið Tjóðveldisfloksins mælti leygardagin tingbólkinum hjá Tjóðveldisflokkinum til at seta Tórbjørn Jacobsen uttan fyri tingbólkin, og møguliga er tíðin hjá skiparanum sum tinglimur Tjóðveldisfloksins er við at renna undan.

- Tað stóð als ikki á dagsskrá til eykaflokstingið leygardagin, at eg skuldi setast uttanfyri tingbólkin, men kortini gjørdist tað høvuðsniðurstøðan á fundinum. Eg helt, at flokstingi skuldi nýtast til at samla flokkin aftur, og ikki spjaða hann enn meir enn frammanundan, sigur Tórbjørn Jacobsen

Sambært floksformanninum, Høgna Hoydal, er lítil ivi um, at Tórbjørn Jacobsen er á veg úr tingmanningini. Tingmanning-